Tinganes var pakkað við fólki til kappróðurin á ólavsøku.

Ein rúgva av fólki leitaðu sær í Miðlahúsið í Vágsbotni at hoyra framførslurnar hjá Sigrid Rasmussen

Raðfestið útbúgving hægri

Ein hornasteinur í ólavsøkurøðuni hjá Hanusi Joensen var útbúgvingarøkið. Stjórin í Tórshavnar Kommunuskúla vísti á, at Føroyar nýta lutfalsliga minst tilfeingi upp á okkara undirvísingarverk sammett við onnur lond.

SETANIN
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

– Øll lond um okkara leiðir eru samd um, at besta íløgan til framhaldandi kappingarføri mótvegis alheiminum og framhaldandi fólkaræðiligari vælverutrygd er ein vælútbúgvin ungdómur. Samstundis má ásannast, at vit, í mun til tey lond, vit dagliga sammeta okkum við, brúka lutfalsliga minst tilfeingi upp á okkara undirvísingarverk og somuleiðis hava fægst undirvísingartilboð til okkara fólkaskúlanæmingar. Ein heldur ivasamur heiður - í hesum globaliseringstíðum.

Í dýrdarveðri setti stjórin í Tórshavnar Kommunuskúla, Hanus Joensen, ólavsøkuna í ár. Eitt yvirskipað evni røðuni hjá Hanusi Joensen var alheimsgerðingin og útbúgvingarverkið. Hann vísti á, at tað er alneyðugt, at útbúgvingarverki fær hægri raðfesting.

-Grundleggjandi treytin fyri støðugari vælferð í londum okkara er rætturin at javnseta útbúgving fyri øll. At vit hava eina útbúgvingarskipan, sum gevur góða og javnbjóðis grundútbúgving til børn og ungdómar og møguleikar til framhaldandi lestur á hægri stigi kring allan heimin. Tað, at øll fáa hollan kunnleika og viðkomandi útbúgvingar, tryggjar støðuga vinnumenning og møguleikar at varðveita eitt samfelag, har fólkaræði, friður, javnrættandi og sosial trygd valda, segði Hanus Joensen millum annað.



Stjórin í Tórshavnar Kommunuskúla, Hanus Joensen, setti ólavsøkuna í ár